FALDARI 7

# 2016 H71 2017

## HEIMA Í HOYVÍK



FTZ DEILDIN

## H71 v STÍF

HOYVÍKSHØLLIN SUNNUDAGIN 12. MARS 2017 KL. 19.00


Auto Service
BÓNUS er biligari!
J&K
TRYGD
INTERSPORT Thomas Dam ítróttur
ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
LAIDERZ
SUÐUROYAR SPARIKASSI

ODDAGREIN:

# GERÐANDISDAGUR AFTUR

## VIT HØVDU IKKI FINGIÐ ARMARNAR NIÐURAFTUR EFTIR STEYPAFINALU-BRAKIÐ, TÁ DYSTUR Í LANDSKAPPINGINI AFTUR STÓÐ FYRI DURUM

Landskappingin hevur annars ligið still síðani á jólum, tá hon fyrst í januar mátti víkja fyri landsdystunum hjá U21- og A-landsliðnum og síðani fyri steypakappingini. Ein steðgur uppá millum tveir og tríggjar mánaðir. Onkur hevur funnist at, at landskappingin soleiðis er býtt upp í tvey. Hetta hevur annars verið skipanin seinastu árini, har steypakappingin hevur verið leikt út í eitt stutt eftir jól og fram til miðjan februar. Í ár lógu landsdystirnir so eisini í januar, og gjørdist steðgurin tí eyka langur. Hvat er rætt og hvat er skeivt, skal ikki vera tikið dagar ímillum. Tó hevur ongin mist nakað við hesum. Ein hevði varhugan av at fleiri av liðunum í kappingini fyri jól, ikki vóru í nóg góðari venjing, hesi lið hava so haft møguleika fyri at koma í venjing henda langa steðg.

Fyrsti dystur okkara í landskappingini var ímóti KÍF í Hoyvík og var hann leiktur sunnudagin hin 26. februar. Tað var við ikki sørt av bivan at ein leitaði sær í høllina til henda dyst, tí ein veit hvussu trupult tað ofta er, at seta seg upp til slíkan fyrsta dyst eftir at hava vunnið eina steypakapping. Onkurs vegna er hetta um at hála seg upp eftir hárinum. Hetta skuldi eisini vísa seg at vera rætt. Fyri tað fyrsta vóru vit skerdir í høgru síðu, har bæði Pætur og Hans Kári, vóru skaddir og hartil høvdu fleiri leikarar trupult við at finna dagsformin. Vit høvdu tó nøkulunda tak uppá dystin, tó at tað glapp loksins í dystinum og vit taptu 23 – 25. Fyrsta tap í 17 dystum og fyrsta tap á heimavølli í hesum leikári yvirhøvur.

Næsti dysturin var so altíð harða uppgávan, at leika ímóti VÍF í Vestmanna mikukvøldið hin 1. mars 2017. Hóast vit hava haft gott tak uppá VÍF í hesum leikári og hava vunnið allar 4 dystirnar vit hava leikt ímóti teimum í lands- og steypakappingini, so er henda uppgáva altíð trupul. Og so at skula leika eitt mikukvøld, gjørdi ikki uppgávuna lættari. Hetta tyktist tó ikki at darva okkara monnum og frá fyrsta bríksli, hevði ein kensluna av, at vit høvdu dystin undir kontrol. Verjuspælið var væl skipað og menn stríddust fyri hvør øðrum. Vestmenningar høvdu soleiðis allan dystin stórar trupulleikar við at koma framat ímóti verjuni og gekst illa hjá annars vanliga væl leikandi skjúttunum hjá VÍF at koma til skot. Í álopinum møttu vit eini offentsivari VÍF verju, ið valdi at verja ógvuliga langt frammi, men loystu vit ta uppgávuna væl og komu væl ígjøgnum, serliga á vengrunum, har Andor og Dánjal á hvør sínum veingi skutu 6 mál hvør. Vit vóru at kalla allan dystin væl undan vestmenningum, bert eina løtu miðskeiðis í øðrum hálvleiki eydnaðist teimum at koma uppá javnt, og endaði dysturin við einum tryggum 27 – 23 sigri.

Haldi at sigast kann, at vit eru komnir væl frá byrjanini uppá landskappingina aftur og eru brynjaðir til at taka eitt síðsta legg fram ímóti finalunum. Um hetta ber til eitt finalupláss, kann bert framtíðin vísa, men menn tykjast klárir til at inna sín part.



**Anna Dam**
forkvinna,
tel. 519082


**Bergtóra Høgnadóttir**
næstforkv., tel. 286011


**Ann-Mari B. Mouritsen**
tel. 214452


**Emy Sólvitsdóttir**
tel. 513769


**René Dahl Olesen**
tel. 235930


**Janet Fríða Johannesen**
tel. 212211


**Símun Poulsen**
tel. 517220


**Erland Jensen**
tel. 243534

**Hondbóltsfelagið H71**, Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067, FO-188 Hoyvík, www.h71.fo





NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

**Ábyrgd av faldara:** Bergtóra Høgnadóttir
**Snið, umbróting og prent:** Føroyaprent




# Heildar-ráðgeving, ið ger mun

Okkara mál er at veita tær ráðgeving, ið kemur allan vegin runt um tíni viðurskifti. Ráðgeving, ið er snikkað til júst tín tørv, soleiðis at tú kanst brúka tíðina til tað, ið hevur týdning fyri teg. Ráðgeving, ið veitir tær eitt gott yvirlit og gevur tær fíggjarligt rásarúm í gerandisdegnum. Við øðrum orðum; ráðgeving, ið gevur meining.

Ynskir tú ta bestu ráðgevingina?

**Bílegg fund á www.banknordik.fo/nordik360**

*Ráðgeving, sum øll skilja*

SENDISTOVAN



# HIN ELEKTRISKI STÓLURIN

## ANNA Á STEIG



### G17 OG 1. DEILD KVINNUR
(17 ÁR)

**Hvørjum plássi spælur tú á?**
– Bakkinum.

**Hvør á liðnum hjá tær er stórsta drama-queenin?**
– Tað man nokk vera venjarin Sonni

**Hevur vánaligasta tónleikasmag?**
– Katrin Vang Højsted.

**Hevur flottastu reyv?**
– Durita Toftum Joensen ger tað gott.

**Er festligast at vera í brúsu saman við?**
– Katrin Vang Højsted.

**Hvat er tað flottasta málið, ið tú hevur skorað í einum dysti?**
– Eg veit ikki.

**Hevur tú nøkur ritualir áðrenn dyst?**
– Nei.

**Hvat er tín besta hondbóltsuppliving?**
– At vinna steypafinaula eftir umdyst ímóti stjørnuni leygardagin.

**Hvør er besti leikari, ið tú hevur spælt ímóti?**
– Turið Arge Samuelsen.

**Hvat fyri skoritriks hevur riggað best hjá tær?**
– Eg fekk sjeikin hjá mær tá eg var 14 ár, og tá var skoritriksi at gera krákufót. Tað riggaði avbera væl.

**Hevur tú nakra flóvisliga hondbólts-søgu at fortelja?**
– Tað er millum meg og liðfelagarnar.

**Hvat ger H71 til besta hondbóltsfelag í Føroyum?**
– Sjálvandi samanhaldi, fólkini og bara Hoyvíkin generelt.

**Hvønn skal eg spyrja næst?**
– Maritu Mortensen.


XL BYG®
TÓRSHAVN
DEWALT
TIMBURHANDIL - BYGGIMARKNAÐUR
og nú eisini
XL BYG®
HANDVERKARABÚÐ
Opið
Mán - frí 08.00 - 17.00
Leygard. 09.00 - 13.00


Lundin Financials
Lundin Løn
Microsoft Dynamics
Trygg
fíggjarstýring
nema
SENDISTOVAN


VANILJU
KREM
Tað besta ómaná
Forkela familjuna. Royn okkara
lekkiliga vaniljukrem.
Nýggj vøra!
SENDISTOVAN

javni

Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 20 80 90
javni@javni.fo
www.javni.fo

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger

Kaj Andreasen & Co
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum



TIT HAVA TØRVIN
VIT ERU VEITARIN.
Handilin við tí fjølbroytta úrvalinum.

Atlas Copco Quality

Atlas Copco

fk




LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO



Dekk
- sjálvandi frá Bilrøkt!
- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil
Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00
bilrokt.fo
Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo




LEASA MEG
PRIVAT LEASING FRA REYNI SERVICE
TOYOTA
3
ÁRA SERVICE PAKKI
YARIS HYBRID
YARIS HYBRID
Einans 3.640,- um mánaðin!
TØRVAR IKKI LØÐING
Við Yaris all in fært tú alt við: Tá er eisini trygging, vektgjald og dekk íroknað. Allir prísir eru við mvg. Eitt stovningargjald á 20.000 kr., eitt fast mánaðargjald og nýggjan bil 3. hvørt ár. Og vit taka okkum av øllum viðlíkahaldi. Sí treytir á reyniservice.fo
REYNI SERVICE
Umhvørvisviðurkent ISO 14001 virki

vistir.fo
haraldsen



trygging.fo



# Tryggja **teg** og **tíni kæru**

Tað er týdningarmikið at tryggja teg og tíni kæru, um tú skuldi verið fyri vanlukku ella sjúku.





Ein **vanlukkutrygging** fevnir um flestar vanlukkur, skaðar og óhapp, sum tú kanst koma út fyri. Til dømis dekkar hon ymisk sløg av tannskaðum og øðrum likamsskaðum, men tilburðurin skal vera íkomin í samband við ein vanlukkutilburð.

**Viðgerðartrygging** er góð og er galdandi alt samdøgrið, bæði tá ið tú ert til arbeiðis og tá ið tú hevur frí. Hon fevnir um pínu, sjúku og fylgjur av vanlukkum, sum krevja viðgerð av serlækna. Hon tryggjar tær viðgerð innan 10 dagar, soleiðis at tú sleppur undan bíðilistum.

**Set teg í samband við okkum og hoyr meira um hesar og aðrar tryggingar.**

Betri pensjón

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR




# Ætlar tú at selja tíni hús í Hoyvík ?

## - vit hava keyparar, ið bíða

INNI

Niels F … a 37 | Tórshavn | Tel 348 900 | inni@inni.fo | inni.fo

# H71 KLÆÐINI 2016/17



## Sweat
Børn: 399-
Vaksin: 449,-

## Jacket
Børn: 449,-
Vaksin: 499,-

## Pants
Børn: 399,-
Vaksin: 449,-

H71 INTERSPORT Thomas Dam ítróttur adidas

JÓN GREGERSEN

# HVUSSU SKAPA VIT EITT ÍTRÓTTARUMHVØRVI VIÐ DYGDARGÓÐARI TALENTMENNING?

**„OFTA VERÐUR TOSAÐ UM AT TAÐ ER ÓTRÚLIGT AT NØKUR FELØG ÁR EFTIR ÁR MEGNA AT MENNA ÚRVALSÍTRÓTTARFÓLK, MEÐAN ONNUR LÍKNANDI FELØG IKKI MEGNA HETTA. TAÐ ER EYÐSÝNT AT ARVALIG GEN OG MIÐVÍS VENJING HAVA NAKAÐ AT SIGA. MEN HÓAST FLEIRI FELØG HAVA VÆLÚTBÚNAR OG MOTIVERAÐAR VENJARAR OG GÓÐAR HENTLEIKAR, SO ER VERULEIKIN TANN, AT NØKUR FELØG MEGNA BETRI ENN ONNUR FELØG AT GANGNÝTA TEIRRA TILFEINGIÐ“.**

## (2. PARTUR)

### AT BÝTA VITAN

Eitt annað sereyðkenni í einum ítróttarumhvørvi við dygdargóðari talentmenning, er eginleikin og áhugin at býta vitan millum teir persónar, ið eru partur av umhvørvinum. Til dømis kunnu venjarar í øllum felagnum býta vitan sínámillum, heldur enn bert at býta vitan og royndir við hjálparvenjarar á sama liði. Við at gerast tilvitaður um og vera opin fyri at býta vitan við aðrar venjarar í felagnum (t.d. millum 1.lið og G17 ella D18), økist møguleikin at læra av tí vitan og teimum royndum, ið aðrir venjarar hava. Harafturat fáa allir partar eina felags fatan av eini felags mannagongd.

Eisini vísur áðurnevnda kanning, at tá ið ungir leikarar hava møguleika at venja saman við sínum fyrimyndum, so førir tað til størri menning. Sokallað meistaralæra. Hetta hevur við sær at tann ungi leikarin hevur møguleika at læra tekniskar førleikar frá tí eldra leikaranum. Eisini gevur tað møguleika at síggja og uppliva hvønn hugburð tann eldri leikarin hevur fyri støðugt at mennast og tískil avrika á einum høgum støði. Tankin um at fara í meistaralæru hjá einum ella fleiri av sínum fyrimyndum er grundaður á at tann eldri leikarin hevur verið ígjøgnum tað menning, sum tann ungi leikarin ynskir. Tískil snýr tað seg um at gagnnýta ta vitan og tær royndir, sum tann eldri leikarin hevur, fyri at økja um møguleikan at mennast mest møguligt.

### AT SKAPA LANGTÍÐAR MENNING HELDUR ENN FYRIBILS ÚRSLIT

Tað er eyðsýnt at ítróttur snýr seg um at vinna. Men um vit ynskja at menna ítróttarfólk, so hevur tað avgerandi týdning, at størri dentur verður lagdur á menning heldur enn úrslit á ungum árum. Hetta er ofta ein tilgongd, ið

*...framhald á síðu 16*

AnniJanni

FOKUS 18:29




## Ger tínar dreymar til veruleika

- sama um tú vilt fara undir útbúgving, ert sjómaður ella vilt spara saman til eini hús.

Fokus pakkin hevur alt tað tú hevur tørv á - NemKontu, FokusLán, FokusKreditt, Gjaldskort, Netbanka og FramtíðarKontu. Sum Fokus kundi fært tú ókeypis tænastur, lagaliga fígging og góða rentu.

**Gjaldskort** **Netbanka** **Fígging** **FramtíðarKonta**

Vitja deildina í Vági og Havn.

**ss.fo**

SUÐUROYAR SPARIKASSI

ítróttarfeløg siga seg hava. Men tað er ikki altíð at tað er samanhangur millum tað ið vit siga at vit ynskja at gera, og tað ið vit gera.

Hetta er ikki bert ein tvístøða fyri tað einstaka felagið. Allir venjarar noyðast eisini at vera tilvitaðir um, og at taka støðu til: Hvat er mítt mál sum venjari? Ynski eg at mítt lið (t.d. G12 ella D12) skal vinna flest møguligar dystir, ella ynski eg at menna flest leikarar, fyri at geva teimum møguleika at íðka úrvalsítrótt, tá ið teir/tær vera vaksnir/vaksnar? Í praksis merkir hetta at venjarar mugu taka støðu til um málið er at vinna fyri ein og hvønn prís, ella um málið er menning.

Tað er sjálvandi týdningarmikið at hava í huga at ungir leikarar læra at kappast og at stríðast fyri at vinna. Tó má úrslitið ikki avgera um teir hava spælt ein góðan dyst ella ei.

Um vit ynskja eitt ítróttarumhvørvi, ið viðvirkar til at menna úrvalsítróttarfólk, hevur tað avgerandi týdning at størri dentur verður lagdur á langtíðar menning heldur enn fyribils úrslit.

At vera tilvitaður um hvørja mentan felagið byggir menning av leikarum á

Tað seinasta evnið í kanningini hjá Kristoffer Henriksen snýr seg um hvørja mentan ein byggir sína leikaramenning á. Fyri at skapa treytir har vit í felag samstarva um at menna tað leikarartilfeingið, ið er til staðar, krevst at vit byggja okkara tilgongd til talentmenning á eina felags mentan.

Tá ið tað snýr seg um at skapa eina mentan har øll arbeiða við tí fyri eyga at menna tann unga leikaran, eru tað serliga trý stig, ið eru týdningarmikil:

1. Tilvitan um hvørja mentan vit ynskja, har vit eisini tryggja at allir partar góðtaka at stríðast fyri at menna júst hesa mentan
2. Týðiligt samskifti har vit greiða frá hvat okkara mentan skal snúgva seg um
3. Tryggja at okkara atburður er í tráð við okkara mentan

Tað finnast ymiskar avbjóðingar í at broyta eina mentan, ið er sum hon „altíð hevur verið".

Í eini roynd at byggja eina ávísa mentan eru tað fleiri feløg, ið velja nøkur virðir sum yvirskrift. Lyklaorð sum dirvi, ábyrgd, samanhald og virðing vera javnan nýtt sum virðir, ið skulu definera eina mentan. Spurningurin er um allir partar (leiðarar, foreldur, venjarar, leikarar og onnur) vita, hvat hesi orð í veruleikanum merkja, og hvussu vit skulu bera okkum at, um vit ynskja at okkara arburður skal vera í tráð við okkara virðir? Mítt svar er nei. Og tískil endar tað ofta við at hesi virðir bert eru orð.

Eisini er ein vanlig avbjóðing at tað ikki altíð er samanhangur millum tað vit siga at vit gera, og tað vit gera. Og um vit ikki „halda orð" og gera tað vit siga at vit vilja gera, so fáa okkara útsagnir minni og minni týdning.

Eitt nú hava fleiri venjarar ein hugburð til hvussu leikarar mennast mest og harvið hava størst møguleika at skapa eina yrkisleið í t.d. hondbólti. Her hoyri eg ofta venjarar nevna at teir sakna at leikarar vísa ágrýtni og venja sjálvir fyri at mennast. Teir sakna at leikarin tekur ábyrgd fyri egnari menning. Hetta kann t.d. snúgva seg um at menna teknik, skjótleika ella úthaldni. Tvs. at venjarar hava ein boðskap um at teir ynskja at eggja leikarum til at venja ella renna eykað. Hóast hesar útsagnir, so hendur ofta tað mótsætta. T.d. nýta fleiri venjarar revsing til at motivera ungar leikarar at stríðast: "tapararnir gera 20 armboyggingar" ella "teir sum tapa skulu renna ein eyka túr". Hóast at tað ikki er vist at hesar útsagnir eru tilvitaðar, so bera tær ein boðskap, ið sigur leikarunum at eykavenjing er fyri taparar. Sostatt er hetta eitt veruleikakent dømi uppá at tað ofta er munur millum tað vit ynskja, tað vit siga, og tað vit gera. Um vit veruliga ynskja at skapa eina mentan, har vit eggja leikarum at venja eyka, og at eykavenjing er fyri vinnarar, so kundi tað verið áhugavert at sagt tað øvuta: "vinnararnir gera 20 armboygginar, og harvið mennast enn meira, meðan teir sum tapa bert skulu hyggja at". Royn tað, og sig mær frá hvussu tað gekk. Møguliga skapar hetta mótstøðu at byrja við. Tó kann hetta vera ein roynd at broyta hugburð viðvíkjandi eyka venjing, og sostatt ein liður í at menna eina mentan har eyka venjing er fyri vinnarar. Og er tað ikki í veruleikanum tað ið vit ynskja?

***...framhald á síðu 25***

# Frítíðin byrjar umborð




Lætt og ómakaleyst ber til at koyra bæði Danmark, Ísland og alt Evropa upp og niður, júst tá passar tær. Við egnum bili er alt nógv lættari. Pakka viðførið í bilin, koyr umborð og njót ferðina.

Tá tú ferðast við Norrönu, kanst tú byrja at halda frí, leingi áðrenn tú kemur fram til títt frítíðarstað ella summarhús. Umborð á Norrönu kanst tú halda frí, so tað stendur eftirí.

Les meira á **www.smyrilline.fo**, skriva til **booking@smyrilline.fo** ella ring **345900**



Vit hava deilt vinningin millum
allar kundar okkara í 50 ár
– og tí halda vit fram við

Kopargøta 1, Tórshavn | www.liv.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

WWW.JANUAR.FO

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

SENDISTOVAN




# Góðir starvsfelagar skapa góð úrslit

"Eg eri vísur í, at tað er góði starvsandin, sum skapar góðu úrslitini hjá Marine Harvest"

*Fjalar, alari í Oyndarfirði*

Marine Harvest strembar eftir at skapa bestu liviumstøður fyri laksin. Vit tryggja okkum, at laksurin er heilsugóður matur. Vit arbeiða í góðum samljóði við umhvørvið og við ábyrgd fyri samfelagnum. Marine Harvest vil vísa vegin til alsamt størri burðardygd.

LAIDERZ
*Better in the long run*






VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI
Alt til HITA
SANITET &
VENTILATIÓN
Maria Poulsen & Co
Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000


ww.kondi.dk
FAXE
KONDI
MED DRUESUKKER


Matstovur keypa gass
og køksútbúnað
frá
p/f Sveisingahandilin
Myklnesgøta 8 · FO-100 Tórshavn · Tel 311909



...bert hugflogið
setur mørk!

OKKARA NÝGGJA SKERIMASKINA

# HUGSA STÓRT

Við nýggju skerimaskinu okkara kunnu vit nú bjóða hesa slóðbrótandi framleiðslu í Føroyum.
Útskorin skelti, stavir, samansetingar og standarar úr flest øllum tilfari og tjúgdum.

**Ja, nú ber veruliga ALT til – Hugsa stórt, hugsa Føroyaprent!**

Ring tel. 314555 og hoyr nærri
www.foroyaprent.fo

Føroyaprent



www.torshavn.fo



Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA




Ung í Eik
www.eik.fo/ung
Tel. 348000

Um vit ynskja at skapa eina mentan, har ungir leikarar hava møguleika at læra av eldri leikarum, so finnast ymiskir møguleikar at gera hetta til veruleika. Tó hevur tað avgerandi týdning at tað er samanhangur millum tað sum vit siga, og tað sum vit gera. Ein møguleiki er at syrgja fyri at leikarar frá G17 ella D18 skifivís fáa møguleika at venja við 1. liði, og at leikarar frá 1. liði skiftivís venja við G17 ella D18. Á tann hátt kunnu teir yngru leikararnir fáa leiðbeining frá meira royndum leikarum, eins og teir eldru leikararnir fáa avbjóðingar í at læra frá sær, og tískil eisini gerast meira tilvitaðir um egnar førleikar. Slíkur atburður kann sostatt viðvirka til at menna bæði teir yngru og teir eldru leikararnar á liðnum, eins og gáttin frá ungdómshondbólti til vaksnamannahondbólt ikki gerst eins høg. Harumframt er tílíkur atburður eisini við til at styrkja mentanina í felagnum. Tá ið teir yngru leikararnir gerast eldri, verður tað natúrligt at luttaka í venjingum saman við yngri leikarum.

Samanumtikið kunnu vit fáa meira burturúr okkara talentmenning, við at leggja størri dent á at menna tað umhvørvið, ið er rundanum tann einstaka leikaran, heldur enn at stríðast fyri at menna einstakar útvaldar leikarar, sum á ungum árum vísa tekin uppá dygdargóðar eginleikar.

Sostatt ræður tað sum felag um at gerast tilvitað. Tilvitað um ein ynskir at stríðast fyri góðum úrslitum her og nú, ella um ein ynskir langtíðar menning. Og tilvitað um hvørja mentan ein ynskir at byggja sítt grundarlag á, og á tann hátt vera eitt enn sterkari felag á tí føroyska ítróttarkortinum.

*Jón Gregersen*

## **H71** D10







***Venjarafrágreiðing D10 á síðu 26***

HENDRIK EGHOLM OG KARL ODDMAR RASMUSSEN
*VENJARAR HJÁ D10 HJÁ H71*

# VENJARAFRÁGREIÐING D10

## GOTT 30 DREINGIR HAVA VERIÐ TILMELDAÐIR D10 HJÁ H71 KAPPINGARÁRIÐ 2016-2017

Ein vanligan dag eru umleið 30 dreingir og venja, onkuntíð eitt sindur færri, onkuntíð eitt sindur fleiri. Venjingarnar ganga væl, og dreingirnir møta væl upp. Sjálvandi kann tað verða eitt sindur rokaligt, tá 30 raskir dreingir eru í gongd á einum og sama hondbóltsvølli, men soleiðis eigur tað at verða. Nakrir leikarar hava spælt hondbólt síðan teir vóru heilt smáir, aðrir í eini 1-2 ár, og so eru aftur nakrir, sum júst eru byrjaðir. Tí royna vit, eftir besta førimuni, at differentiera venjingarnar soleiðis, at dreingirnir fáa tað venjing, teir hava brúk fyri – og allir hava ikki brúk fyri somu venjing, tað er púra vist. Hetta gera vit við at skipa venjingarnar soleiðis, at allir dreingirnir venja saman umleið helvtina av tíðini, hareftir deila vit upp, so at A og B venja á eini hálvu, og C og D á hini hálvuni. Vit eru aloftast 3 venjarar í høllini. Í felagsvenjingini eru allir venjararnir um dreingirnar samstundis, tá deilt verður upp, eru aloftast tveir venjarar hjá C og D liðunum, og ein hjá A og B liðunum. Hóast dreingirnir ikki duga tað sama leikliga, og tíðskil ikki skulu hava júst somu venjing, ganga vit høgt uppí, at allir skulu hava sama uppmerksemi og venjingarmongd og dygd, líkamikið hvussu teir eru fyri leikliga júst nú. Hetta eydnast fyri tað mesta, hóast vit ikki kunnu útiloka, at yvirlitið onkuntíð svíkir.

Vit hava meldað fýra lið til landskappingina. A og B liðini eru í A bólkinum, meðan C og D liðini eru í C bólkinum. A liðið er nummar 2 í A bólkinum, B liðið er nummar 5. Vit eru sera fegin um, at vit hava heili tvey lið í A-bólkinum. B-liðið hjá okkum kundi uttan problem vunnið B-bólkin, men teir kempa heldur í A-bólkinum, og av hesi orsøk hava teir hava ment seg sera nógv í ár. Bæði A og B liðini eru góð lið, og vit eru ikki í iva um, at komandi árini fara leikararnir á hesum liðum at spæla um føroyameistaraheitir. Hetta serliga, tí liðini hjá okkum ikki eru tengd at einstøkum leikarum, sum skjóta 80-90% av málunum, men hava javnt góðar leikarar á øllum plássum, og allir leikararnir eru við í spælinum. Eingin leikari hevur fast pláss á liðnum – har verður dúgliga skift runt á plássunum – og hetta er rættiliga sjáldsamt í deildini, men vit halda, at hetta førir til meiri komplettar leikarar, hóast tað kann ávirka úrslitini her og nú.

C liðið er nummar 2 í C bólkinum, og D-liðið er nummar 7. Okkara C og D lið spæla einans móti B-liðum hjá hinum feløgunum. Hetta sigur nakað um tilfeingið, vit hava í Hoyvík. C og D liðini klára seg eisini væl, leikararnir eru dugnaligur og ágrýtnir, og vit fara heilt vist at síggja nógv til fleiri av teimum komandi árini. Fyri onkrar er skiftið frá U8 til U10 eitt sindur trupult, fyri aðrar ikki, men soleiðis eru børn so ymisk. Og teir, sum júst eru byrjaðir at spæla, teir læra meiri og meiri fyri hvørja viku. At verða C og D liðsleikari, og spæla móti B-liðum, er ikki altíð lætt, kanska serliga hjá teimum dreingjum, sum júst eru byrjaðir at spæla hondbólt, men tað gongur, og menningin er stór.

Týdningarmest er tó, at allir leikararnir hava tað stuttligt, dáma at spæla hondbólt, og føla seg heima í felagsskapinum rundanum H71 og D10. Hetta kann einanst tryggjast í tøttum samstarvi millum felag, venjarar, leikarar og foreldur. Tað samstarvið er fyri tað mesta gott, og vit samskifta javnan við foreldur um hvat gongur væl, og hvat gongur minni væl – hetta samskifti eru vit glaðir fyri. Eisini eru foreldrini ófør at hjálpa til – við draktum, til dystir og einstøk eisini til venjing.


HANDLA
Ein heimur fyri seg av
tilfari til skapandi sálir
01
GLOSSY
www.handla.fo

BERGTÓRA HØGNADÓTTIR
*SAMRØÐA VIÐ PETER KROGH*

# VIT SÍGGJAST

**Í SUMMAR FLYTIR PETER KROGH TIL DANMARKAR AFTUR, HANN HEVUR GJØRT EIN 2-ÁRA SÁTTMÁLA VIÐ FELAGIÐ SKIVE FH. SAKNUR VERÐUR Í OKKARA KNÁA SKJÚTTA**

Men Peter sigur, at hann avgjørt væntar, at hann um nøkur ár kemur aftur til Føroyar. Hetta er ikki eitt farvæl, men heldur eitt vit síggjast, sigur hann. Saknur verður í honum, stórskjúttanum Peter Krogh. Hann skjýtur sum fáur – og ikki nokk við tað: hann skjýtur við báðum hondum – og líka væl við báðum hondum. Og júst hesum júnikka førleikanum gleða tey seg eisini at fáa gleði og gagn av hjá hjá Skive Fh, sæst á heimasíðu teirra.

Men útyvir at duga væl at skjóta, hava vit í felagnum eisini havt gleði og gagn av Petur'sa sosialu førleikum – altíð blídligur, dámligur og fyrikomandi.

## VENJARIN OG KVEIKJARIN

At Peter umframt at verða evnaríkur og djarvur hondbóltsspælari eisini hevur dygdir sum venjari er ein sannroynd. Hann hevur verið venjari hjá G17 bæði í fjør og í ár. Í fjør vunnu hesar landskappingina og komu í steypafinaluna. Í ár vunnu tær stetypafinaluna. Umframt at Peter hevur havt hepna hond sum venjari, so hevur hann jú hendan sjáldsama førleikan at skjóta – serstakliga væl enntá – við báðum hondum. Tað merkir at fleiri Hoyvíksbørn hava kent seg kveikt av hesum og stundum eisini venja júst hetta, at skjóta við báðum hondum. So hvør veit, kanska Peter eisini setir síni spor í felagnum á tann hátt, at fleiri børn og ung í felagnum fara at fáa góðar royndir, sum skjúttar við báðum hondum.



***Peter, Guðrun og Rósa***

***...framhald á síðu 37***

# TÁ RÆTT SKAL VERA RÆTT

SENDISTOVAN



ADVOKATSKRIVSTOVAN

Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO


Bilasolan.fo
Nýggi Audi A3 Sportback
Langt á odda.
Audi
Vorsprung durch Technik
Bilasølan
Vegurin langi, 359700


Altíð okkurt
sunt og gott
www.fast.fo
fast:


SEX
KREVUR
SAMTYKKI!




NORÐOYA SPARIKASSI

# Orkulán 2,5%

*- Bústaðarlán við lágari rentu*

***Bílegg eitt***
***kundaprát***
*og fá meira at vita*
*um fyrimunirnar*
*við orkuláninum*



*Norðoya Sparikassi - Hoyvíksvegur 67 - FO-100 Tórshavn Tel. 47 5000 - ns@ns.fo - www.ns.fo*

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

# Hesin er við í prísinum í trý ár..!

**Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.**



*Heðin Weihe, verkstaðsleiðari*



Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.



**Í Gullpakkanum fært tú:**

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

# SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum

Roknskapinum

Lønarumsitingini

Sjálvuppgávuni

Kapitalvinnings-
sjálvuppgávuni

Rentustuðlinum

Útlendskum
skatti

Afturrindan
av mvg

Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT løggildir grannskoðarar

FAROE SHIP

BYGMA
BALSLEV

Stuðlar ítróttini

SAMSKIP
Saman røkka vit málinum

yviri við Strond 23 – Postbox 3255 – Tel. 30 88 00 – Fax. 30 88 01 – www.samskip.com



## HVUSSU BYRJAÐI ALT?

– Jú, eg kendi Mark, sum longu var í Føroyum. Hann ringdi og spurdi um eg var áhugaður. Eg tók av at koma heim at kanna málið – royndarvandi við monnunum, tosaði við nevndini um ein møguligan sáttmála og ikki minst, so var eg bæði í heitum potti og í grillsmáttuni hjá Petur Even í veitslulag. Longu áðrenn eg fór av landinum aftur kendi eg meg sannførdan um, at her vildi eg fegin vera eina tíð. So eg hevði satt at siga undirskrivað sáttmálan við H71 áðrenn eg fór til Danmarkar aftur. Og tað havi eg onga løtu angrað. Fyri at siga tað púra erligt, so tímdi eg slettis ikki til Danmarkar, tá vikusiftið var av. Hevði notið tað.

## KOM AFTUR Á ÓLAVSØKU

Eftir røttum skuldi eg byrja venjingina í H71 í august – men leikararnir søgdu, at ólavsøka var sakin og skuldi upplivast. So eg kom uppaftur longu undan ólavsøku – marsjeraði við leikarunum og alt. Sera stuttlig og hátíðarlig uppliving. Ólavsøkan var øðrvísi enn nakað annað, eg havi upplivað. Eg var tikin á bóli. Ein øðrvísi máti at vera saman, nógv fólk, stuttligt at vitja fólk. Og búnin! Føroyski búnin er so sera, sera vakur. Kundi væl hugsað mær at átt ein. Tað verður kanska einaferð – kenni meg eitt sindur uttanfyri, tá eg ikki eigi ein føroyskan búna.

## ÓHØVISKT AT VERA STUNDISLIGUR

Hetta hevur verið ein serlig tíð – so nógvar og stórar broytingar hava verið. Føroyar eru heilt serstakar. Her er púra vist vakurt, havi ongantíð sæð slíkt áður. Eavi kent meg so vælkomnan. Øll hava verið blíð og fryntlig við meg og bjóða mær heim. Eg havi onga løtu kent meg einsamallan her. Hetta við, at alt ikki er SO skipað hóskar væl til mín – eg eri heldur ikki so kalendarafikseraður. Satt at siga, skuldi egtó venja meg við at fólk koma so seint, altíð ov seint – eitt nú í veitslulag. Og tá eg spurdi, flentu tey bara. Í Føroyum er ófólkaligt, at koma stundisliga, tað skuldi eg venja meg við – nú dámar mær tað væl.

## MEN STØRSTUR ER KÆRLEIKIN

Eg havi upplivað so nógv gott í Føroyum – bæði á og uttanfyri vøllin. Tað allarbesta er sjálvsagt og uttan samanbering Gudrun, unnustan og dóttir okkara Rósa. Einki er betri enn tað – tað var ein púra óvæntað gáva, at eg fekk hesar báðar kvinnurnar í lív mitt, nú meðan eg havi verið her. At koma heim, hvønn dag til hesar praktfullu og vøkru kvinnurnar. Tað kann ikki vera betri. Eg gleði meg altíð til at koma heim. Sjálvandi kann tað eisini vera strævi at vera smábarnafamilja, men tað er heilt fantastiskt. Og tær gera sjálvsagt eisini, at eg havi fest røtur her í enn størri mun enn áður. Eg trívist væl her og kann væl ímynda mær, at vit flyta aftur higar og eg kann væl ímynda mær, at vit sum familja velja at búleikast her og ynskja at dóttir okkara veksur upp her.



*Vit í H71 ynskja tær eina góða ferð aftur til Danmarkar. Takk fyri tíðina her, tú hevur ríkað okkum og vit hava notið at hava teg her. Bestu eydnu til tín Gudruna og lítlu Rósu. Vit ynskja tykkum blíðan byr og fegnast um, at tit slettis ikki fara enn – fyrst eru fleiri týdningarmiklir dystir fyri framman, várið og summarið. Vit gleðast um at hava teg her og siga eisini bar: vit síggjast!*

## H71

1 Ári E. **Dam**
16 Jens **á Skipagøtu**

3 Hjalte **Bachmann**
4 Rúni **Vest Højgaard**
5 Bogi **Gaard Davidsen**
8 Pætur **Thomsen**
10 Vilhelm **Poulsen**
11 Hans Kári **Hansen**
14 Sigmundur **H. Dahl**
15 Sigmundur **Nolsøe**
18 Andor **Sivertsen**
22 Helgi **Hoydal**
23 Hilmar Leon **Jakobsen**
24 Niklas **Højgaard Hanusarson**
45 Peter **Krogh**
73 Dánjal **Tórgarð**
89 Jónas **G. Djurhuus**
99 Tróndur **Arge**

**Venjari:** Sonni D. V. Larsen
**Hjálparvenjari:** Mark Lausen-Marcher
**Málmansvenjari:** Jens á Skipagøtu
**Styrkivenjari:** Heri Ziska
**Liðleiðari:** Petur Sivertsen
**Fysioterapeutur:** Bartal Dahl Andreassen

## StÍF

1 Carsten **Bang**
12 Arnhold **Berg**

2 Fríði **Djurhuus**
4 Allan **Norðberg**
5 Pætur **Joensen**
6 Jónfinn **Rasmussen**
7 Pætur **Johansen**
8 Teitur **Nilssen**
9 Sveinur **Justinussen**
11 Tummas **Simonsen**
13 Borgar **Persson**
14 Jógvan **Gregersen**
15 Eyðbjørn **Eiriksson**
19 Rúni **Niclassen**

**Venjari:** Tomasz Zilberberg
**Á bonkinum:** Marius Joensen,
Rósing Hansen og Jóhannes Olsen

## Dystaryvirlit hjá H71 í FTZ-deildini:

| | | |
|---|---|---|
| 18.09.2016 | **H71** - Team Klaksvík | **36**-19 |
| 21.09.2016 | StÍF - **H71** | 23-**36** |
| 25.09.2016 | **H71** - Kyndil | **26**-19 |
| 06.10.2016 | Neistin - **H71** | 26-**23** |
| 08.10.2016 | KÍF - **H71** | 29-**23** |
| 16.10.2016 | **H71** - VÍF | **28**-17 |
| 23.10.2016 | Kyndil - H71 | 21-**29** |
| 26.10.2016 | Team Klaksvík - **H71** | 22-**29** |
| 30.10.2016 | **H71** - StÍF | **25**-25 |
| 09.11.2016 | **H71** - KÍF | **23**-22 |
| 13.11.2016 | **H71** - Neistin | **22**-20 |
| 27.11.2016 | **H71** - Kyndil | **24**-23 |
| 11.12.2016 | VÍF - **H71** | 27-**29** |
| 14.12.2016 | **H71** - Team Klaksvík | **35**-16 |
| 17.12.2016 | StÍF - **H71** | 21-**24** |
| 26.02.2017 | **H71** - KÍF | **23**-25 |
| 01.03.2017 | VÍF - **H71** | 23-**27** |
| 08.03.2017 | Team Klaksvík - **H71** | - |
| 12.03.2017 | **H71** - StÍF | - |
| 19.03.2017 | **H71** - Neistin | - |
| 25.03.2017 | Kyndil - **H71** | - |
| 01.04.2017 | Neistin - **H71** | - |
| 09.04.2017 | **H71** - VÍF | - |
| 15.04.2017 | KÍF - **H71** | - |

## Støðan í FTZ-deildini:

| Nr. | Lið | Dystir | V.M | T.M | Munur | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **1** | **H71** | **17** | **462** | **378** | **84** | **27** |
| 2 | KÍF | 18 | 467 | 427 | 40 | 25 |
| 3 | VÍF | 16 | 488 | 412 | 76 | 21 |
| 4 | Kyndil | 17 | 442 | 415 | 27 | 20 |
| 5 | Neistin | 18 | 450 | 471 | -21 | 17 |
| 6 | StÍF | 18 | 482 | 504 | -22 | 11 |
| 7 | Team Klaksvík | 18 | 381 | 565 | -184 | 1 |

## ÆTLAR TÚ AT STOYPA?

Tosa fyrst við okkum.

Framkomna, teldustýrda betong-blandiskipanin syrgir fyri, at tú kanst vera heilt vísur í, at tú fært betong av allarbestu góðsku bæði til nýtslu á landi og undir vatni
Blandi- og pumpubilar okkara bera so í bandi, at útkoyring og fylling í formar v.m. ikki er nakar trupulleiki - heldur ikki um tvørligt er at sleppa framat.

Vit koyra um alt landið og eru kappingarførir í prísi!



**J & K Betong**

á Hjalla | Postboks 3179 | FO-110 Tórshavn | tel 31 50 60 | fax 31 41 94 | e-mail: jkp@jkp.fo | www.jkp.fo
Blandimeistarin tel 58 50 25

# »GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«



## ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · JULIANNA KLETT